**Formula-deildin**

| | | | v | - | j | - | t | v | t | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
| 1 | B36 | 22 | 14 | - | 6 | - | 2 | 40 | 14 | 26 | 48 |
| 2 | NSÍ | 22 | 15 | - | 3 | - | 4 | 39 | 19 | 20 | 48 |
| 3 | HB | 22 | 13 | - | 3 | - | 6 | 53 | 29 | 24 | 42 |
| 4 | EB/S | 22 | 12 | - | 3 | - | 7 | 38 | 27 | 11 | 39 |
| 5 | KÍ | 22 | 8 | - | 4 | - | 10 | 38 | 35 | 3 | 28 |
| 6 | Skála | 22 | 8 | - | 3 | - | 11 | 23 | 33 | -10 | 27 |
| 7 | GÍ | 22 | 7 | - | 5 | - | 10 | 30 | 45 | -15 | 26 |
| 8 | B71 | 22 | 6 | - | 5 | - | 11 | 31 | 40 | -9 | 23 |
| 9 | AB | 22 | 4 | - | 5 | - | 13 | 27 | 44 | -17 | 17 |
| 10 | VB/S | 22 | 2 | - | 5 | - | 15 | 21 | 54 | -33 | 11 |

**1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 23 | 20 | - | 2 | - | 1 | 70 | 16 | 54 | 62 |
| 2 | ÍF | 23 | 15 | - | 4 | - | 4 | 65 | 20 | 45 | 49 |
| 3 | FSV04 | 23 | 15 | - | 3 | - | 5 | 42 | 27 | 15 | 48 |
| 4 | LÍF | 23 | 12 | - | 1 | - | 10 | 58 | 39 | 19 | 37 |
| 5 | TB | 23 | 11 | - | 4 | - | 8 | 44 | 26 | 18 | 37 |
| 6 | HB | 23 | 9 | - | 2 | - | 12 | 34 | 43 | -9 | 29 |
| 7 | NSÍ | 23 | 8 | - | 1 | - | 14 | 38 | 58 | -20 | 25 |
| 8 | SÍ | 23 | 6 | - | 3 | - | 14 | 31 | 55 | -24 | 21 |
| 9 | KÍ | 23 | 5 | - | 2 | - | 16 | 23 | 58 | -35 | 17 |
| 10 | B36 | 23 | 2 | - | 2 | - | 19 | 19 | 82 | -63 | 8 |

# Gullið fer til Gøtu

**Umboð fyri FSF vera í Sarpugerði, har KÍ eftir øllum at døma fer at vinna 8. FM heitið á rað í morgin**

KVINNUFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fótbóltsárið hjá kvinnunum endar í morgin. Tá verða tveir teir síðstu dystirnir spældir. GÍ og KÍ spæla í Gøtu, og AB og B36 spæla á Argjum.

Tað er longu greitt, at GÍ hevur vunnið bronsumerkini. Alt bendir á, at KÍ fer at vinna FM og gullkrónurnar. Treytin er, at KÍ vinnur á GÍ. Alt annað enn trý stig til KÍ hevði verið óhugsandi.

B36 hevur í hvussu so er vunnið silvurkrónurnar. Um B36 vinnur á AB, liggur vónin fyri gullinum í, at KÍ kiksar í Gøtu.

Umboð fyri FSF fara til Gøtu við bronsukrónunum til GÍ og gullkrónunum til KÍ og ferðasteypinum. KÍ hevur vunnið FM sjey tær seinastu ferðirnar, og tað ljóðar, at ikki so fáir klaksvíkingar fara undir Leirvíksfjørð seinnapartin í morgin fyri at stuðla einum at stóru ítróttarstoltleikunum í býnum.



*KÍ kann tryggja sær meistaraheitið í bestu kvinnudeildini sunnudagin, tá tær vitja í Gøtu.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Spæla um pyntið

**Hvørki KÍ ella GÍ hava møguleika at røkka toppinum ella at koma í vanda fyri at flyta niður**

KÍ-GÍ
*Jákup Mørk*

Seinastu 27 árini hava KÍ og GÍ á hvørjum ári tykist í fremstu fótbóltsrøðini. Samantalt er eingin ivi um, at GÍ hevur verið stinnari – teir hava vunnuð FM seks ferðir, meðan KÍ hevur vunnið tvær ferðir – men innanhýsis uppgerðirnar hava ofta verið tættar, og fleiri ferðir hevur nógv staðið upp á spæl, tá ið tað er liðið út á ári.

Soleiðis er ikki hesa ferð. KÍ og GÍ hava ikki møguleika at vinna heiðursmerkir, og liðini eru heldur ikki í vanda fyri at flyta niður.

Ofta klaksvíkingar staðið seg væl í Gøtu, og gøtumenn hava fingið nógv burturúr í Klaksvík. Soleiðis er hevur eisini verið í ár. GÍ vann í 9. umfari 3-2 í Klaksvík, og í 18. umfari vann KÍ 1-0 í Sarpugerði.

Fyri viku síðani løgdu bæði feløgini rygg til tap. Hjá KÍ var tað stórt vónbrot – eftir at hava fingið stig burturúr fimm ferðir á rað – at tapa á Argjum, har klaksvíkingar í 2. hálvleiki vóru niðurspældir. GÍ vísti í torføru avbjóðingini á heimavølli ímóti B36 góðan hugburð, hóast GÍ tapti 1-0.

Síðani 1980, tá ið GÍ trein inn í fremstu røðina, har gøtumenn síðani hava verið saman við KÍ, hevur GÍ 29 ferðir spælt landskappingardystir í Klaksvík. Hagtølini staðfesta útsøgnina, sum sigur, at GÍ plagar at standa seg væl í Klaksvík.

GÍ hevur vunnið 12 landskappingardystir í Klaksvík, KÍ hevur 11 ferðir vunnið á heimavølli ímóti GÍ, og seks ferðir hevur tað verið javnt. Í málum stendur á jøvnum – 52-52.



*GÍ og KÍ hava at kalla bert æruna at spæla fyri, tá tey hittast í Sarpugerði sunnudagin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Við – ikki við

**Skaddur: Rasmus Nolsøe (fótliður)**
**Ivasamur: Rógvi Jacobsen (fótskaði)**

**Ivasamur: Jústines R. Hansen (vøddaskaði)**

**Ivasamur: Pauli G. Hansen (fótskaði), Slavisa Kaplanovic (vøddaskaða) og Arnhold Berg (knæskaði)**

**Leikbann: Símun Joensen**
**Við aftur: Kaj Ennigarð og Denni Conteh**

**Við aftur: Martin Tausen (eftir leikbann)**